e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**1. deild kvinnur: Støðan undan vikuskiftinum**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 11 | 11 - 0 - 0 | 687 | 567 | 120 | 31 |
| 2 VÍF | 11 | 9 - 0 - 2 | 668 | 518 | 150 | 29 |
| 3 StÍF | 12 | 8 - 0 - 4 | 689 | 596 | 93 | 27 |
| 4 Kyndil | 12 | 7 - 0 - 5 | 680 | 578 | 102 | 21 |
| 5 KÍF | 12 | 3 - 0 - 9 | 534 | 687 | -153 | 7 |
| 6 H71 | 11 | 2 - 0 - 9 | 537 | 653 | -116 | 6 |
| 7 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 539 | 735 | -196 | 3 |

**1. deild menn: Støðan undan vikuskiftinum**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmun ur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 545 | 426 | 119 | 25 |
| 2 Neistin | 9 | 7 - 0 - 2 | 416 | 393 | 23 | 19 |
| 3 Kyndil | 10 | 5 - 1 - 4 | 474 | 421 | 53 | 18 |
| 4 VÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 463 | 437 | 26 | 16 |
| 5 VB | 10 | 3 - 0 - 7 | 511 | 520 | -9 | 10 |
| 6 Tjaldur | 9 | 0 - 0 - 9 | 330 | 542 | -212 | 0 |

# Hvar endar gullið ?

*Hondbóltur: Bæði í Vestmanna og í Havn er spenningurin stórur undan finaludystin í 1. deild hjá monnum, sum teimum flestu kunnugt, verður spældur í høllini í Vestmanna í dag millum VÍF og Neistan*

Terji Nielsen

Eingin ivi er um, at klokkan fýra seinnapartin í dag er ikki eitt sitipláss eftir í høllini í Vestmanna. Um man ætlar sær sess til spennandi finaluna millum VÍF og Neistan, so noyðist man helst at vera í høllini longu, tá ið kvinnurnar hjá somu feløgum fara at spæla sín dyst fimm korter undan monnunum. Bæði í Vestmanna og í Havn hevur nógv hondbóltsprát verið hesa vikuna undan dystinum, og vit hava hitt tveir av ídnastu viðhaldsmonnunum hjá liðunum báðum.

### Royndirnar hava nógv at siga

Ein av dyggastu stuðlunum hjá Neistanum í nógv ár, bæði á vøllinum og uttan fyri vøllin, er Vagnur Michelsen. Tá ið Neistin seinast vann føroyameistaraheitið í bestu mansdeildini í 1978, var Vagnur millum leikararnar á liðnum.

Vagnur heldur, at traditiónirnar, sum vestmenningar hava á heimavølli, hava ótrúliga nógv at siga í dag. Somuleiðis heldur hann, at vestmenningar hava eitt sálarligt yvirvág, tí teir hava staðið seg betur enn Neistin í teimum innanhýsis dystunum. Seinasta dystin, sum liðini bæði spældu í Vestmanna, vann VÍF stórt, og Vagnur metur møguleikarnar at vinna dystin verða 60-40 til fyrimuns fyri vestmenningar. Tað hevur eisini nógv at siga, at vestmenningar hava nógv fleiri royndir við at spæla slíkar avgerandi dystir, har tað snýr seg um knall eller fall, leggur hann aftrat. Hinvegin hava neistamenn bert spælt ein slíkan dyst, og tað var steypafinaluna, og tá mistu teir alt á gólvið, hóast teir høvdu trygga leiðslu, og tað situr kanska í bakhøvdinum á neistaleikarunum.

Eitt, sum Vagnur metir kemur at hava stóran týdning, er, hvussu málverjarnir hjá liðunum fara at standa seg. Allir fýra málmennirnir hjá liðunum báðum, Eli og Bárður hjá VÍF, og Bogi og Petur hjá Neistanum, eru góðir málmenn, men teir eru ikki javnt góðir og kunnu hava minni góðar dagar, og tí kann dagsformurin hjá teimum hava stóran týdning í dag. Vagnur heldur, at Eli og Bárður hava mangan bjargað vestmenningum, og tað sama kann sigast fyri Boga og Petur, ið eisini hava bjargað Neistanum í fleiri dystum. Ein annar leikari, sum kann vera avgerandi fyri dystin í morgin, sambært Vagni, er Ingi Olsen, tí sum hann sigur, so er tað bara ein Ingi Olsen í føroyskum hondbólti. Hann stýrimaðurin hjá vestmenningum, bæði í álopi og í verju.

Sambært Vagni, so er tað lítið at ivast í, at tað fara at verða fleiri mansverjingar í dystinum í dag. Sannlíkt er, at vestmenningar fara at mansverja í hvussu so er annan av stórskjúttunum hjá Neistanum, antan Heina Joensen ella Áka Olsen, um ikki báðir blíva mansvardir. Eisini heldur Vagnur, at tað er stórur møguleiki fyri, at Neistin fer at mansverja antin Inga Olsen ella Sámal Joensen, um ikki báðar. Hvussu hesar mansverjur fara at eydnast kemur at hava stóran týdning fyri gongdina í dystinum, sigur Vagnur Michelsen og leggur aftrat, at eftir hansara tykki liggur eitt eyka trýst á Áka Olsen, sum í dag skal royna at vinna meistaraheitið ímóti barndómsfelagnum við beiggja sínum á odda.



Hans Johannus á Brúgv: VÍF leikararnir eru vanir við at spæla slíkar altavgerandi dystir, og tí ivist eg ikki í, at teir vinna dystin í dag



Vagnur Michelsen: Møguleikarnir eru 60-40 til fyrimuns fyri vestmenningar

### Neistafólkini hava vónina

Hóast Vagnur kanska ljóðar eitt sindur dapurskygdur, so hevur hann tó vónina um, at Neistin fer at vinna í dag, og hann heldur ikki, at tað er púrasta ómøguligt. Sum hann eisini sigur, so var ósigurin í steypakappingini ógvuliga tungur at svølgja hjá neistaáskoðarunum, tí at liðið hevði so trygga leiðslu í dystinum, meðan ein tepur ósigur í dag, har Neistin hevur gjørt eitt gott avrik, hevði verið nógv lættari at svølgt enn steypaósigurin.

Tíverri liggur tað ikki fyri hjá Vagni at fara til Vestmannar í dag, men hann ivast ikki í, at ein stór fjøld av neistafólkum fara at leita sær norður til Vestmannar at stuðla teimum bláu úr Havn, sum kanska fara at vinna sítt fyrsta føroyameistaraheiti í manshondbólti í 22 ár.

### Fiskasølustjórin er sannførdur um sigurin

Stjórin á Fiskasøluni, Hans Johannus á Brúgv, er millum ídnastu viðhaldsfólkini hjá VÍF. Hann ivast ikki í, at tað fer at eydnast vestmenningum at vinna føroyameistaraheiti í dag. Høvuðsorsøkin til, at Hans Johannus ikki ivast í hesum, er, at leikararnir hjá VÍF hava meiri rutinu og eru vanir við at spæla slíkar altavgerandi dystir, har nógv stendir upp á spæl. Sum dømi um hetta nevnir hann dystin á Skála sunnudagin, har VÍF vann tryggan sigur á strandingum. Hann heldur, at tað hevur víst seg fleiri ferðir, at vestmenningar standa seg ógvuliga væl undir trýsti, meðan neistamennirnir ikki eru vanir við at spæla undir slíkum trýsti.

Fiskasølustjórin heldur, eins og Vagnur Michelsen, at avrikin hjá málmonnunum koma at hava sera stóran týdning fyri dystin í dag. Í hesum sambandi nevnir hann eisini dystin á Skála sunnudagin, har Bárður Nielsen spældi ein branddyst, og við honum á odda fingu vestmenningar ein tryggan sigur í hús. Hans Johannus sigur, at tá ið málverjarnir hjá VÍF standa seg væl, so klárar liðið sum heild seg eisini væl.

At maður fer av húsi í Vestmanna í dag, ivast Hans Johannus á Brúgv ikki í. Hann roknar við, at høllini verður stúgvað langt undan dystarbyrjan. Hann hevur eins og nógvir aðrir vestmenningar hugsað nógv um hondbólt síðstu dagarnar, og hann roknar við, at hýrurin í høllini verður øgiligur í dag, tá ið dómararnir fara at bríksla dystin í gongd.

At vestmenningar standa seg so væl í hondbólti ár um ár, heldur Hans Johannus skyldast, at teir bert halda seg til tað einu ítróttargreinina. Um veturin er tað hondbólturin, meðan tað um summarið er kapplóður. Hetta er tað sama galdandi í vinnulívinum, heldur fiskasølustjórin, tí har klárar tú teg eisini best, um tú bert heldur teg til eina branchu. At góðu úrslitini hjá VÍF eisini hevur ført við sær, at áskoðararnir eru ógvuliga krevjandi, viðgongur Hans Johannus á Brúgv, sum sjálvur hevur sæð allarflestu dystirnar hjá VÍF í ár, og sum sjálvsagt eisini verður millum áskoðararnar í høllini í Vestmanna í dag.



*Hjalmar Klein Olsen, VÍF venjari:*

# - Teir ungu skulu taka yvir

*Hondbóltur: Venjarin hjá vestmenningum, Hjalmar Klein Olsen, sigur, at tað merkist væl á spælarunum hjá VÍF, at teir eru spentir til dystin í dag.*

Terji Nielsen

Vestmenningar hava vant sum vanligt fram til finaludystin ímóti Neistanum í Vestmanna í dag. Hjalmar Klein Olsen sigur, at teir hava ikki vant meira enn vanligt, og venjing, sum vant, hevur verið skipað út frá hvat mótstøðuliðið er, næstu ferð teir skulu á vøllin.

### Allir eru klárir

Eins og hjá Neistanum, so eru allir leikararnir hjá VÍF klárir til dystin í dag. Hópurin verður tann sami, sum hann var á Skála sunnudagin. Einasti spælarin, sum er skaddur, er Daniel Rapa, men hann hevur verið so lítið við í ár.

Hjalmar sigur seg rokna við, at Neistin í stóran mun fer at taka teir stóru skjúttarnar hjá vestmenningum, Inga og Sámal, burtur úr dystinum, og tískil verður tað ein stór uppgáva hjá Hjalmari at fáa teir ungu leikararnar at taka yvir og harvið vísa ábyrgd. Í hesum sambandi nevnir venjarin hjá vestmenningum, at tað hava ungu spælararnir megnað væl higartil í kappingarárinum, so tað stúrir hann ikki fyri.

At Neistin hevur minni roynt fólk enn VÍF, er Hjalmar ikki heilt samdur í, men hann sigur, at telur man saman, hvussu nógvar 1. deildardystir leikararnir í teimum báðum hópunum hava spælt tilsamans, so hevur neistahópurin óivað spælt líka nógv sum hópurin hjá VÍF. Hinvegin hava so at siga allir leikararnir hjá VÍF spælt fleiri altavgerandi dystir, og tað hava leikararnir hjá Neistanum ikki.

Teir hava bert spælt steypafinaluna, og hon eydnaðist sum kunnugt ikki so væl.

### Hjalmar biðin at halda fram sum venjari

At Hjalmar skuldi verða venjari hjá VÍF, var ikki ætlanin, tá ið kappingarárið byrjaði, men tá nakað var farið av kappingarárinum fekk hann eina áheitan frá felagnum um taka við venjarastarvinum, og hann játtaði. Hetta hevur, sum teimum flestu kunnugt, gingið stak væl, og nú hevur nevndin í VÍF so heitt á Hjalmar um at halda fram sum venjari komandi ár. Tað er Hjalmar eisini áhugaður fyri, so alt bendir á, at tað aftur verður hann, ið skal standa við róðrið hjá besta mansliðnum hjá VÍF næsta kappingarár.

Hjalmari dámar væl at verða venjari, og tað er nakað heilt annað enn at vera spælari. Tað skal eitast, at hann leikandi venjari, men seinastu nógvu dystirnar hevur Hjalmar als ikki spælt við. Um hann verður venjari næsta ár, so er tað rættuliga avmarkað, hvussu nógv hann fer at spæla við, sigur Hjalmar, men leggur aftrat, at verður hópurin nógv merktur av skaðum, so er ikki óhugsandi, at hann fer aftur á vøllin.

Annars fara leikararnir sjálvir ikki at gera nakað serligt burtur úr dystinum í morgin, men hittast privat klokkan hálvgum tvey, sum vanligt er. Klokkan trý verður so farið niðan í høllina at gera seg kláran til dystin. At høllin longu tá verður stúgvandi full av áskoðarum, ivast Hjalmar ikki í, og hann sigur, at ætlar man sær góðan sess til dystin í morgin, so noyðist man at vera í góðari tíð.



Ein av stóru spurningum leygardagin man vera, hvør av Olsen-beiggjunum fer at standa seg betri. Báðir hava teir í øllum førum stóran týdning fyri lið sítt

*Páll Poulsen, Neistavenjari:*

# - Spælararnir merkja trýstið

*Hondbóltur: Venjarin hjá Neistanum, vestmenningurin Páll Poulsen, sigur, at hýrurin í neistahópinum er góður undan finaludystinum í Vestmanna í dag, men at spælararnir eru rættuliga nervøsir*

Terji Nielsen

Tað stendur nógv á spælarunum hjá bæði VÍF og Neistanum undan finaludystinum í dag, men neistavenjarin heldur, at spælararnir hjá Neistanum merkja trýstið betur enn spælararnir hjá vestmenningum, tí at vestmenningarnir eru meiri vanir við støðuna, og tískil ikki geva tí so nógvan ans.

### Allir eru klárir

Neistahópurin hevur hesa vikuna vant mánakvøld, týskvøld og mikukvøld, meðan teir hava hildið frí hósdagin og fríggjadagin. Eingin eyka venjing hevur verið, og spurdur um teir hava vant nakað serligt til dystin, sigur Páll Poulsen, at tá ið man hevur eitt so mikið nýtt lið, sum neistaliðið er, so venur man nakað nýtt, so at siga hvørja ferð venjing er. Allir spælararnir eru klárir til dystin, og eingin hevur nakran skaða at dragast við.

Páll Poulsen sigur, at allir spælararnir hjá Neistanum eru ógvuliga spentir til dystin, men at teir eisini eru rættuliga nervøsir. Sum áðurnevnt, so heldur Páll, at vestmenningar eru meiri vanir við støðuna enn neistamenninir, og hetta er til fyrimuns fyri VÍF, sigur hann. Sum dømi um hetta nevnir hann, at tá ið Neistin leikti steypafinaluna, høvdu teir greiða leiðslu, men komu so undir trýst, og tá skuldu teir minni royndu leikararnir á liðnum taka yvir, og tað kláraðu teir als ikki. Hetta eru spælararnir hjá Neistanum væl greiðir yvir, og hetta hevur teir óivað eisini í bakhøvdinum til dystin í dag, har tað er væl hugsandi, at teir komu út í eina líknandi støðu, og tí skal tað helst ikki kiksa í dag.

Neistavenjarin leggur tó afturat, at á liðnum hjá vestmenningum eru eisini nógvir ungir og óroyndir leikarar, men teir hava tó spælt fleiri avgerandi dystir enn leikararnir hjá Neistanum.

### Tíðliga norður at venja seg við umstøðurnar

Páll Poulsen heldur, at trýstið á neistaleikararnar er nógv hægri, enn tað kanska átti at verið, tí fólk hava væntað so nógv av teimum, sjálvt um liðið er spildurnýtt, og tí kanska hevði havt brúk fyri eitt sindur meiri av tíð til at blíva samanspælt í. Men nú er liðið komið í eina støðu, har teir kunnu avgera føroyameistaraheiti til egnan fyrimun, og tá nyttar einki at siga, at vit eru nøgdir við annað enn gullið, heldur venjarin hjá Neistanum.

Annars vil Páll Poulsen ikki siga nakað serligt um taktiska uppleggið til dystin í dag, men hann viðgongur, at teir fara at royna at verja so væl sum møguligt fyri royndastu og vandamiklastu leikarunum hjá vestmenningum ( her verður kanska serliga hugsað um Inga og Sámal), so at trýstið blívur lagt á teir ungu og óroyndaru leikararnar hjá VÍF.

Neistahópurin hittist í dag klokkan eitt, og ein tíma seinni verður farið til Vestmannar. Hetta er kanska nakað tíðliga, halda summi, men hetta verður gjørt, so at leikararnir hjá teimum bláu úr Havn kunnu venja seg við atmosferuna í "heksaketlinum", sum Páll málber seg.

# AGF vann umdystin

*Fótbóltur: Liðið hjá Óla Johannesen vann eisini umdystin ímóti Esbjerg, sum bleiv leiktur hóskvøldið.*

Terji Nielsen

Nógv umrøddi umdysturin millum AGF og Esbjerg í Superligaiini bleiv leiktur á Árhus Stadion hóskvøldið. Heldur ikki hesaferð var Óli Johannesen við á liðnum AGF, sum vann dystin 1-0. Eins og í kolldømda dystinum millum liðini í heyst, var tað íslendingurin Tómas Ingi Tómasson, sum skeyt málið fyri liðið úr Árhus. Málið kom longu, tá ið tveir minuttir vóru leiktir av dystinum, tá ið íslendingurin kom at standa púra leysur (fleiri vildu vera við, at hann var rangstaddur) framman fyri málinum hjá Esbjerg, og hann ivaðist ikki, men smekkaði bóltin í málið.

Tað var annars Esbjerg, sum kanska hevði tað mesta spælið, men liðið fekk ikki spælt seg til nakrar serligar málmøguleikar, og AGF fekk harvið øll trý stigini, og hetta merkir, at liðið hjá Óla Johannesen nú kom upp um niðurflytingarstrikuna, meðan Esbjerg fór niðurum.